ATLANTIC AIRWAYS




# Roknskapur 1-3. ársfjórðing

## 1-3 Quarter Report

## 2008

www.atlantic.fo

# Partafelagsupplýsingar /
# *Information regarding the company*

**P/F Atlantic Airways**
Vagar Airport
FO-380 Sørvágur
Faroe Islands
Tel + 298 34 10 00
Fax +298 34 10 01
Skrásetingar nr. 1223 / *Reg. no. 1223*
V-tal 379778 / *VAT Number 379778*
Heimstaðarkommuna / *Domicile municipality*: Sørvágs
www.atlantic.fo

**Partabræv / *Share***
Virðisbrævamarknaður / *Stock Exchange*
VMF Market on NASDAQ OMX Iceland
NASDAQ OMX Copenhagen
Fondskota FO 0000000062 /
*ISIN code FO0000000062*
Partapeningur / *Share Capital* DKK 103,500,000
Tal av partabrøvum / *No. Of Shares* 1,035,000

**Nevnd / *Board of directors***

Christian Andreasen, formaður / *chairman*
Eyðfinnur Jacobsen, næstformaður / *vice chairman*
Petur J. Eiriksson
Verna Rasmussen
Ingi S. Joensen

**Stjórn / *Management***

Magni Arge, forstjóri / *Managing director*
Marius Davidsen, fíggjarstjóri / *Finance director*

**Grannskoðan / *Auditor***

**Rasmussen & Weihe**
Statsautoriserað grannskoðarafelag P/F

## Triði ársfjórðingur í stuttum

- Umsetningurin triðja ársfjórðing í 2008 var 178,9 mió. kr. samanborið við 158,6 mió. kr. triðja ársfjórðing í 2007.
- Úrslitið fyri skatt triðja ársfjórðing var 16,7 mió. kr. samanborið við 20,8 mió. kr. triðja ársfjórðing í 2007.
- Úrslitið eftir skatt triðja ársfjórðing var 13,7 mió. kr. samanborið við 17 mió. kr. sama tíðarskeið í fjør.
- Úrslit áðrenn avskrivingar (EBITDA) triðja ársfjórðing var 37,9 mió. kr. samanborið við 30,1 mió. kr. triðja ársfjórðing í 2007.
- Avskrivingar vóru 17,2 milliónir krónur triðja ársfjórðing sammett við 12,3 milliónir krónur triðja ársfjórðing í fjør.
- Fíggjarútreiðslurnar vóru 4 mió. kr. triðja ársfjórðing samanborið við 3 mió. kr. í fíggjarinntøkum somu tíð í 2007.
- Meðalprísurin á brennievni triðja ársfjórðing í 2008 var 65% hægri enn sama tiðarskeið í fjør.
- Flogførini flugu 4.285 tímar triðja ársfjórðing samanborið við 2.862 tímar triðja ársfjórðing í fjør.

## *Third quarter in brief*

- *Revenue for the third quarter of 2008 was DKK 178.9 million compared to DKK 158.6 million for the third quarter of 2007.*
- *The result before tax for the third quarter was DKK 16.7 million compared to DKK 20.8 for the third quarter of 2007.*
- *The result after tax for the third quarter was DKK 13.7 million compared to DKK 17 million the same period last year.*
- *The result before depreciation (EBITDA) for the third quarter was DKK 37.9 million compared to DKK 30.1 million for the third quarter of 2007.*
- *Total depreciation for the third quarter of 2008 was 17.2 million compared to DKK 12.3 million in the third quarter last year.*
- *Net financial expenditure was DKK 4 million in the third quarter compared with a net financial income of DKK 3 million in the third quarter of 2007.*
- *The average price of fuel in the third quarter of 2008 was 65% higher than the price for the same period last year.*
- *The aircraft were airborne for 4,285 hours in the third quarter compared to 2,862 in the third quarter last year.*

## 1-3. ársfjórðing 2008 í stuttum

- Umsetningurin 1-3. ársfjórðing var 428,9 mió. kr. samanborið við 431,5 mió. kr. í 2007.
- Úrslitið fyri skatt 1-3. ársfjórðing var 17 mió. kr. samanborið við 36,1 mió. kr. triðja ársfjórðing í 2007.
- Úrslitið eftir skatt 1-3. ársfjórðing í ár var 13,9 mió. kr. í avlopi samanborið við 29,6 mió. kr. í avlopi í 2007.
- Úrslitið áðrenn avskrivingar (EBITDA) var 73,2 mió. kr. fyrstu níggju mánaðirnar í ár samanborið við 60,7 mió. kr. sama tíðarskeið í 2007.
- Avskrivingar vóru 46,9 milliónir krónur 1-3. ársfjórðing sammett við 31,8 milliónir krónur í fjør.
- Fíggjarútreiðslurnar vóru 9,3 mió. kr. 1-3. ársfjórðing í 2008 samanborið við 7,1 mió. kr. í fíggjarinntøkum í 2007.
- Útreiðslurnar til brennievni á rutuflúgvingini øktust 21 mió. kr. fyrstu níggju mánaðirnar í 2008 samanborið við somu tíð í fjør.
- Eginognin 30. september 2008 var slakar 225 milliónir krónur og solvensprosentið 50%.
- Flogfør og tyrlur vóru á flogi samanlagt 11.449 tímar januar-september 2008 samanborið við 8.793 tímar somu tíð í fjør.
- Felagið hevur staðið fyri at útbúgva og venja umleið 80 flogfólk higartil í 2008 m.a. í sambandi við leiguflúgving fyri SAS.
- Felagið ásannar, at raksturin kann ávirkast av viðbrekninum bæði í føroyska og altjóða búskapinum, eins og ársúrslitið kann ávirkast av broytingum í oljuprísi, eftirspurningi eftir flogferðum, gjaldoyra, kostnaðarstøði, veðri og operativum viðurskiftum.

## *The first 3 quarters of 2008 in brief*

- *Revenue for the first 3 quarters of the year was DKK 428.9 million compared to DKK 431.5 million last year.*
- *The result before tax for the first 3 quarters was DKK 17 million compared to DKK 36.1 million for the first 3 quarters of 2007.*
- *The result after tax for the first 3 quarters year was DKK 13.9 million compared to DKK 29.6 million in 2007.*
- *The result before depreciation (EBITDA) was DKK 73.2 million compared to DKK 6079 million for the first 3 quarters of 2007.*
- *Total depreciation for the first 3 quarters of 2008 was 46.9 million compared to 31.8 million in 2007.*
- *Net financial expenditure was DKK 9.3 million for the first 3 quarters of 2008 compared with a net financial income of DKK 7.1 million for the same period in 2007.*
- *Fuel costs on scheduled services increased by DKK 21 million in the first nine months of 2008 compared to the same period last year.*
- *As of 30 September 2008, equity was just under DKK 225 million, and the resulting equity ratio 50%.*
- *Aircraft and helicopters were airborne for a total of 11,449 hours for the first 3 quarters of the year compared to 8,793 hours the same period in 2007.*
- *The company has educated and trained around 80 flight crew during the first 3 quarters of 2008.*
- *The company realises that the profit and loss account can be affected by the frailty of both the Faroese and international economies, as well as the result for the year can be affected by changes oil prices, demand for airline travel, currency fluctuations, the general level of cost, the weather, and operations.*

# Innihaldsyvirlit / *Table of Contents*

Síða / *Page*

**Partafelagsupplýsingar** / *Information regarding the company* ..................... 1

**Triði ársfjórðingur og 1-3. ársfjórðing 2008 í stuttum**
/ *Third Quarter and 1-3 Quarter of 2008 in brief* .......................................... 2

**Gongdin seinastu 5 ársfjórðingarnar** / *Five Quarter Summary* ................. 5

**Frágreiðing fyri triðja ársfjórðing og 1-3. ársfjórðing**
/ *Comments on Third Quarter and 1-3 Quarter of 2008* ................................ 7

**Roknskapartøl 1-3. ársfjórðing** / *1-3 Quarter Accounts* .............................. 14

**Roknskaparátekning** / *Statement by the Board and Management* ................ 22

**Roknskaparháttur** / *Accounting Principles* ................................................ 23

# Gongdin seinastu 5 ársfjórðingarnar / *Five Quarter Summary*

## Rakstur / *Income Statement*

| (Kr. 1000) | Q3 2008 | Q2 2008 | Q1 2008 | Q4 2007 | Q3 2007 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Nettosøla / *Net sales*** | 178.859 | 137.452 | 112.591 | 107.248 | 158.550 |
| Flúgvikostnaður / *Flight expenses* | -111.812 | -83.792 | -76.707 | -80.665 | -104.691 |
| Starvsfólkakostnaður / *Employee expenditures* | -29.177 | -29.365 | -24.859 | -23.451 | -23.777 |
| Avskrivingar / *Deprecations* | -17.218 | -15.294 | -14.354 | -13.492 | -12.280 |
| **Úrslit áðrenn fíggjarligar postar / *Result before financial items*** | **20.652** | **9.001** | **-3.329** | **-10.360** | **17.802** |
| Fíggjarinntøkur / *Financial income* | 415 | 415 | 433 | 5.416 | 4.132 |
| Fíggjarútreiðslur / *Financial expenses* | -4.401 | -1.507 | -4.695 | -2.102 | -1.156 |
| **Úrslit áðrenn skatt / *Result before tax*** | **16.666** | **7.909** | **-7.591** | **-7.046** | **20.778** |
| Skattur / *Tax* | -2.985 | -1.460 | 1.388 | 1.261 | -3.745 |
| **Úrslit / *Profit*** | **13.681** | **6.449** | **-6.203** | **-5.786** | **17.033** |

## AKTIV / *ASSETS*

| (Kr. 1000) | Q3 2008 | Q2 2008 | Q1 2008 | Q4 2007 | Q3 2007 |
|---|---|---|---|---|---|
| Materiell støðisogn í alt / *Fixed assets* | 325.176 | 334.545 | 280.929 | 290.493 | 268.098 |
| Fíggjarlig støðisogn í alt / *Total financial assets* | 7.606 | 9.181 | 8.785 | 14.052 | 15.742 |
| **Støðisogn í alt / *Total fixed assets*** | **332.782** | **343.726** | **289.714** | **304.545** | **283.840** |
| Nýtsluvøra íalt / *Total consumables* | 1.067 | 1.403 | 1.075 | 1.088 | 1.104 |
| Áogn í alt / *Total receivables* | 58.357 | 61.700 | 58.839 | 45.890 | 64.289 |
| Tøkur peningur / *Cash and cash equivalents* | 56.218 | 77.181 | 45.048 | 37.967 | 35.928 |
| Ogn í umferð í alt / *Total current assets* | 115.642 | 140.284 | 104.962 | 84.945 | 101.321 |
| **Aktiv í alt / *Total assets*** | **448.424** | **484.010** | **394.676** | **389.489** | **385.161** |

## PASSIV / *LIABILITIES*

| (Kr. 1000) | Q3 2008 | Q2 2008 | Q1 2008 | Q4 2007 | Q3 2007 |
|---|---|---|---|---|---|
| Eginogn í alt / *Total equity* | 224.937 | 211.256 | 207.673 | 213.677 | 225.389 |
| Avsetingar í alt / *Total provisions* | 26.307 | 23.322 | 21.862 | 23.250 | 24.555 |
| Stutt- og langfreista skuld í alt / *Total short- and long-therm debt* | 197.180 | 249.432 | 165.141 | 152.563 | 135.217 |
| **Passiv í alt / *Total liabilities*** | **448.424** | **484.010** | **394.676** | **389.489** | **385.161** |

# Lyklatøl / *Ratios*

| | Q3 2008 | Q2 2008 | Q1 2008 | Q4 2007 | Q3 2007 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Fíggjarlig lyklatøl / *Financial ratios*** | | | | | |
| Úrslit áðrenn avskrivingar og leasingarútreiðslur / *EBITDAR* | 39.683 | 26.161 | 12.569 | 5.041 | 32.211 |
| Úrslit áðrenn avskr. og leasingarútr. (%) / *EBITDAR margin (%)* | 22% | 19% | 11% | 5% | 20% |
| Úrslit áðrenn avskrivingar / *EBITDA* | 37.870 | 24.295 | 11.025 | 3.132 | 30.082 |
| Úrslit áðrenn rentur / *Operating profit (EBIT)* | 20.652 | 9.001 | -3.329 | -10.360 | 17.802 |
| Úrslit áðrenn skatt / *EBT* | 16.666 | 7.909 | -7.591 | -7.046 | 20.778 |
| Rakstraravkast / *Net profit ratio* | 12% | 7% | -3% | -10% | 11% |
| Ognaravkast / *Return on investments* | 5% | 2% | -1% | -3% | 5% |
| Gjaldførisevni / *Current ratio* | 26% | 29% | 27% | 22% | 26% |
| Solvensprosent / *Solvency ratio* | 50% | 44% | 53% | 55% | 59% |
| Renting av eginogn áðrenn skatt / *Return on equity before tax* | 7% | 4% | -4% | -3% | 9% |
| Renting av eginogn eftir skatt / *Return on equity after tax* | 6% | 3% | -3% | -3% | 8% |
| Vinningur pr. útreiðslukrónu / *Income/cost ratio* | 8% | 5% | -5% | -5% | 12% |
| **Hagtøl / *Statistics*** | | | | | |
| Útboð av tøkum seturkilometrum - rutuflúgving / *Capacity - scheduled flight (ASK)* | 117.840 | 100.285 | 74.565 | 77.844 | 120.080 |
| Seldir seturkilometrar - rutuflúgving / *Traffic - scheduled flight (RPK)* | 98.037 | 74.711 | 56.624 | 60.584 | 99.202 |
| Loadfaktorur / *Load factor* | 83% | 74% | 76% | 78% | 83% |
| Ferðafólkatal - ruta / *P assenger - sheduled flights* | 74.386 | 56.049 | 41.322 | 44.726 | 75.144 |
| Flogfør / *Aircrafts operated* | 7 | 7 | 7 | 7 | 5 |
| Tyrlur / *Helicopters operated* | 4 | 4 | 3 | 3 | 2 |
| Flogtímar íalt / Total *Airborne hours* | 4.285 | 3.764 | 2.495 | 2.301 | 2.862 |
| Starvsfólk (ársverk) / *Number of full-time employees* | 252 | 236 | 204 | 192 | 192 |

# Partabrøv / *Shares*

| | Q3 2008 | Q2 2008 | Q1 2008 | Q4 2007 | Q3 2007 |
|---|---|---|---|---|---|
| Tal av partabrøvum / Number of shares | 1.035.000 | 1.035.000 | 1.035.000 | 1.035.000 | 1.035.000 |
| Úrslit pr. partabræv / *Earnings after tax per share* | 13 | 6 | -6 | -6 | 16 |
| Innara virði pr. partabræv / *Book value per share* | 217 | 204 | 201 | 206 | 218 |
| Vinningsbýti pr. partabræv / *Dividend per share* | - | - | - | - | - |
| Kursur við ársfjórðingsenda / *Share price quarter-end* | 192 | 194 | 198 | 235 | |
| Kursur við ársfjórðingsenda / Ársúrslit pr. partabræv / *Share price quarter-end / Earnings after tax per share (P/E)* | - | - | - | | |
| Kursur við ársfjórðingsenda / Innara virði pr. partabræv / *Share price quarter-end / Book value per share (P/B)* | - | - | - | | |

# Frágreiðing fyri triðja ársfjórðing og 1-3. ársfjórðing / *Comments on Third Quarter and 1-3 Quarter of 2008*

## Ferðslan

Ógvusligu rembingarnar innan fíggjarheimin og stóru sveigginí í prísi fyri brennievni noyddu í vár flogfeløg um allan heim at laga sín rakstur til nógv broyttu fortreytirnar. Fleiri feløg hóraðu ikki undan, men Atlantic Airways telist millum tey feløg, sum megnaðu at laga sín rakstur til broyttu umstøðurnar og kann tí vísa á ein sunnan rakstur í triðja ársfjórðingi og í árinum sum heild.

Flúgvingin fyri onnur feløg vaks heili 153% í triðja ársfjórðingi, meðan rutuflúgvingin var á leið tann sama sum somu tíð í fjør. Ferðafólkatalið stagneraði í summar, og tekin eru um, at vøksturin er av á hesum sinni. Tyrlurnar flugu á leið sama tímatal sum triðja ársfjórðing í 2007. Tilsamans flugu flogfør og tyrlur 4.285 tímar samanborið við 2.862 tímar sama tíðarskeið í fjør.

Samlaða framleiðslan hjá felagnum øktist við 30% fyrstu níggju mánaðirnar samanborið við sama tíðarskeið í 2007. Samanlagt vóru flogfør og tyrlur á flogi 11.449 tímar 1-3. ársfjórðing í mun til 8.793 tímar sama tíðarskeið í fjør.

## *Traffic Development*

*Global financial sector turmoil and the volatility in fuel prices this spring meant that airlines all over the world had to adjust their operations accordingly. Some could not, but Atlantic Airways is one of the companies that has managed to adjust to the changed circumstances, and can therefore show healthy operations in the third quarter, and for the year as a whole.*

*Charter operations increased by a massive 153% in the third quarter, while scheduled services were on the same level as the same period last year. Passenger numbers stagnated over the summer period, and indications are that the growth we have seen in recent years has reached its peak for the time being. Helicopters were airborne around the same number of hours as in the third quarter of 2007. Aircraft and helicopters were airborne for a total of 4,285 hours compared to 2,862 hours the same period in 2007.*

*The company's total production increased by 30% in the first nine months of 2008. Aircraft and helicopters were airborne 11,449 hours in the first three quarters compared to 8,793 hours the same period last year.*

## Rutuflúgving

Ferðafólkatalið við rutuflogførum triðja ársfjórðing var umleið 74.000 ferðafólk ella eitt vet minni enn triðja ársfjórðing 2007. Hetta var fyrsta tekin um, at vøksturin í ferðafólkatalinum seinastu árini er stagnerandi. Útboðið varð skorið nakað í august og september í mun til forsagnirnar, men kortini gjørdist bert talan um sera lítla minking í ferðsluni, tí bókingarnar komu seinni enn vanligt.

Fyrstu níggju mánaðarnar í ár er samlaða ferðafólkatalið við rutuflogførum økt við 4.412 ferðafólkum, ið er 3%, úr 167.345 upp í 171.757 ferðafólk. Nýtsluprosentið á rutunetinum var óbroytt samanborið við sama tíðarskeið í fjør, 78%.

## *Scheduled services*

*The number of passengers on scheduled flights in the third quarter was slightly less than last year, at around 74,000. This is the first indication that the growth in passenger numbers over the last few years is stagnating. Supply was decreased in August and September relative to forecast, but even so the volume of traffic decreased only very little, as bookings were later than normal.*

*Total passengers on scheduled flights in the first nine months of 2008 increased by 4,412, which is a 3% increase from 167,345 to 171,757 passengers. The load factor on the route network was unchanged at 78% compared to the same period last year.*

## Leiguflúgving

Leiguflúgvingin øktist við 153% triðja ársfjórðing samanborið við sama tíðarskeið í fjør. Tímatalið fór úr 890 tímum upp í 2.253 tímar. Trý flogfør flúgva í løtuni fyri SAS.

Tríggjar teir fyrstu ársfjórðingarnar í ár øktist leiguflúgvingin við 2.602 tímum upp í 5.781 tímar ella 82%. Meginparturin av hesi flúgving er fyri SAS á teirra rutuneti. Felagið hevur útbúgvið og vant úti við 80 flogfólk til at røkja flúgvingina fyri SAS.

## *Charter operations*

*Charter operations increased by 153% in the third quarter compared to the same period last year. Airborne hours increased from 890 to 2,253 hours. Currently 3 aircraft are wet leased to SAS.*

*For the first nine months of the year, charter and wet lease operations increased by 2,602 hours to 5,781 hours, an increase of 82%. The majority of the activity is charters for SAS on their routes. The company has educated and trained close to 80 crew members to service the charters for SAS.*

## Tyrluflúgving

Virksemið innan tyrluflúgving var í triðja ársfjórðingi á leið tað sama sum somu tíð í 2007, slakar 350 tímar. Umframt SAR og flúgving innanoyggja í Føroyum røkti ein tyrla við manning eisini SAR og charter-flúgving fyri Air Greenland í Grønlandi eitt tíðarskeið. Nýggja AW 139 tyrlan varð leigað til Agusta í Italia í juli mánaði.

Tilsamans vóru tyrlurnar á flogi 905 tímar fyrstu níggju mánaðirnar samanborið við 988 tímar sama tíðarskeið í fjør.

## *Helicopter service*

*Helicopter activity in the third quarter was on the same level as in the same period of 2007, just under 350 hours. In addition to SAR and inter-island operations in the Faroe Islands, one helicopter was for a period of time in Greenland on SAR and charter duty for Air Greenland. The new AW 139 helicopter was leased to Agusta of Italy in July.*

*In the first nine months of the year, the helicopters were airborne for 905 hours compared to 988 hours the same period last year.*

## Búskaparliga gongdin

Úrslitið áðrenn avskrivingar (EBITDA) var 37,9 milliónir krónur triðja ársfjórðing í 2008 samanborið við 30,1 milliónir krónur triðja ársfjórðing í 2007.

Eftir skatt var úrslitið triðja ársfjórðing 13,7 milliónir krónur samanborið við 17 milliónir krónur sama tíðarskeið í fjør.

Úrslit áðrenn avskrivingar (EBITDA) var 73,2 milliónir krónur fyrstu níggju mánaðirnar í 2008 samanborið við 60,7 milliónir krónur sama tíðarskeið í 2007.

Eftir skatt var úrslitið 1-3. ársfjórðing í ár 13,9 milliónir krónur samanborið við 29,6 milliónir krónur í avlopi árið fyri.

Avskrivingar eru vaksnar úr 31,8 milliónum krónum í fjør upp í 46,9 milliónir krónur 1-3. ársfjórðing í ár. Hesin vøkstur stavar frá stórari tilgongd av aktivum.

Fíggjarútreiðslurnar vóru netto 9,3 milliónir krónur fyrstu níggju mánaðarnar í 2008, meðan talið sama tíðarskeið í fjør var ein fíggjarinntøka upp á 7,1 milliónir krónur.

## *Financial statement*

*The result before depreciation (EBITDA) was DKK 37.9 million in the third quarter of 2008 compared to DKK 30.1 million in the third quarter of 2007.*

*Net profit after tax in the third quarter was DKK 13.7 million compared to DKK 17 million the same period last year.*

*For the first nine months of 2008, EBITDA was DKK 73.2 million compared to DKK 60.7 million the same period last year.*

*Net profit after tax for the first nine months was DKK 13.9 million compared to DKK 29.6 million the previous year.*

*Depreciation has increased from DKK 31.8 million for the first nine months of 2007 to DKK 46.9 million the same period this year. This increase is due to significant investments made.*

*Net financial expenditure was DKK 9.3 million in the first nine months of 2008 compared to net financial income of DKK 7.1 million for the same period last year.*

**Inntøkur og kostnaðir**

Útreiðslur til brennievni vuksu við 45% í triðja ársfjórðingi samanborið við sama tíðarskeið í fjør, og samanlagt hevur felagið goldið 21 milliónir krónur meiri fyri olju til rutuflúgvingina fyrstu níggju mánaðirnar í ár samanborið við í fjør. Felagið hevur sett fleiri tiltøk í verk, sum hava økt um inntøkurnar fyri hvønn ferðandi og minkað framleiðslukostnaðin. Útboðið er tillagað, so fleiri ferðandi eru á hvørjari fráferð, og tiltøk eru sett í verk at minka um oljunýtslu og CO2-útlát. Oljuavgjaldið varð fyrr í ár hækkað, eins og ávísar tillagingar vóru gjørdar í prísskipanini og bonusskipanini. Eisini aðrar rationaliseringar eru framdar. Hóast ferðafólkatalið ikki vaks, so tryggjaði hægri meðalinntøka ein vøkstur í inntøkunum frá rutuflúgvingini.

Inntøkur felagsins øktust 20 milliónir krónur upp í 179 milliónir krónur triðja ársfjórðing í ár samanborið við 159 milliónir krónur triðja ársfjórðing í fjør.

Inntøkurnar higartil í ár eru 429 milliónir, sum er á sama støði sum fyrstu níggju mánaðirnar í fjør, tá inntøkurnar vóru 432 milliónir krónur.

Starvsfólkakostnaðurin er vaksin við 5 milliónum krónum í triðja ársfjórðingi samanborið við sama tíðarskeið í fjør, og samanlagt er talan um ein vøkstur á góðar 15 milliónir krónur 1-3. ársfjórðing. Talið á ársverkum triðja ársfjórðing var 252, ið er 60 fleiri enn triðja ársfjórðing í fjør. Økta talið á ársverkum hevur beinleiðis samband við vøksturin í leiguflúgvingini, men starvsfólkakostnaðurin er eisini ávirkaður av hækkandi lønarstøði og útbúgving av flogfólki. Umframt tey 252 ársverkini skulu eisini leggjast aftrat flogfólkini frá SAS, sum telja umleið 30 ársverk.

Endurnýggingin av flogførum og tyrlum hevur við sær øktar avskrivingar í 2008. Tvey RJ 85 flogfør komu í flotan seinna hálvár í fjør, eins og ein Bell 412 tyrla varð tikin í nýtslu í november í 2007. Flogskýlið og Bell 212 tyrlan, sum vórðu skotin inn í felagið seinna hálvár í fjør, bera eisini vaksandi avskrivingar við sær. Ein nýggj Agusta Westland AW139 tyrla kom í flotan fyrr í ár. Avskrivingar vóru 46,9 milliónir krónur fyrstu níggju mánaðirnar sammett við 31,8 milliónir krónur fyrstu níggju mánaðirnar í fjør.

Fíggjarútreiðslurnar vóru netto 9,3 milliónir krónur 1-3. ársfjórðing 2008, meðan talið sama tíðarskeið í fjør var positivt við 7,1 milliónum krónum í fíggjarinntøkum. Høvuðsorsøkin stavar frá kursbroytingum í partabrøvum í Atlantic Petroleum, sum í fjør kastaðu av sær 8,6 milliónir, meðan óstaðfest kurstap fyrstu níggju mánaðirnar í ár er 3,4 milliónir krónur. Samanlagt ein munur í fíggjarinntøkum frá virðisbrøvum upp á 11 milliónir krónur.

***Revenue and costs***

*Fuel costs increased by 45% in the third quarter compared to the same period last year, and the company paid DKK 21 million more for fuel in the first nine months of 2008 compared to the first nine months of 2007. The company has put several measures in place to increase per-passenger income and decrease production cost. Adjustments have been made to supply, so that now there are more passengers on each flight, and also action has been taken to decrease fuel consumption and CO2 emissions. The fuel surcharge was increased earlier this year, and also certain amendments were made to the pricing system and the bonus scheme. Other rationalisations have also been carried out. The higher yield ensured an increase in revenue from scheduled operations, despite stagnating passenger numbers.*

*The company's revenue for the third quarter increased by DKK 20 million to DKK 179 million compared to DKK 159 million in the third quarter of 2007.*

*Revenue for the first nine months of the year was DKK 429 million, which is on the same level as last year, when corresponding period revenue was DKK 432 million.*

*Employee costs increased by DKK 5 million in the third quarter compared to third quarter 2008, and for the first nine months of 2008, the increase is DKK 15 million. As of 30 September 2008, the number of full-time equivalent employees was 252, which is 60 more than at the same time last year. The increase in employee numbers is directly related to the increase in charter operations, but employee costs are also influenced by a general rise in the level of wages, and also training costs. In addition to the 252 full-time employees, the rented SAS-crew number approximately 30 full time employees.*

*The renewal of the aircraft and helicopter fleet has led to higher depreciation in 2008. Two RJ 85 aircraft were added to the fleet in the second half of 2007, as well as a Bell 412 helicopter entering service in November 2007. Also, the injection by the Government of the aircraft hangar and a Bell 212 helicopter into the company in the second half of 2007 has increased depreciation. A new Agusta Westland AW-139 helicopter has been added to the fleet in 2008. Total depreciation in the first nine months of 2008 was DKK 46.9 million compared to DKK 31.8 million in the same period last year.*

*Net financial expenditure was DKK 9.3 million in the first nine months of 2008 compared a net financial income of DKK 7.1 million the same period last year. The main reason for this change is market value adjustment of the shares in Atlantic Petroleum which last year yielded DKK 8.6 million, while so far this year, the non-realised market value adjustment is a loss of DKK 3.4 million – a total change in financial income from shares of DKK 11 million.*

## Fíggjarstøða

Fíggjarstøðan hjá felagnum 30. september 2008 javnvigaði við 448 milliónum krónum, ið er 59 milliónir krónur hægri enn við ársbyrjan.

Materiella støðisognin er hækkað við 35 milliónum krónum 1-3. ársfjórðing samanborið við ársbyrjan. Flotin er í ár vaksin við einari AW-139 tyrlu.

Tøkur peningur er øktur við 18 milliónum krónum upp í 56 milliónur krónur.

Áognin er økt við 12 milliónum krónum síðani ársbyrjan.

Av samlaðu fíggjarstøðuni var eginognin 30. september 225 milliónir krónur og solvensprosentið 50%.

Samlaða skuldin er økt við 45 milliónum krónum upp í 197 milliónir krónur. Harav var langfreistaða skuldin 142 milliónir, ið er 49 milliónir krónur hægri enn við ársbyrjan.

## *Balance Sheet*

*As of 30 September 2008, the balance sheet total was DKK 448 million, which is DKK 59 million higher than at the beginning of the year.*

*Material fixed assets increased by DKK 35 million during the first nine months of 2008. One AW-139 helicopter has been added to the fleet in 2008.*

*Cash increased by DKK 18 million to DKK 56 million.*

*Debtors have increased by DKK 12 million since the beginning of the year.*

*Out of the balance sheet total, equity amounted to DKK 225 million as of 30 September 2008, resulting in an equity ratio of 50%.*

*Total debt increased by DKK 45 million to DKK 197 million. Out of this, long-term debt amounted to DKK 142 million, which is an increase of DKK 49 million in 2008.*

## Partabrøv

Kursurin á partabrøvum í Atlantic Airways P/F var tann 19. november skrásettur til 176, ið er 25% lægri enn við ársbyrjan. Marknaðarvirðið á felagnum var hendan dagin 182 milliónir krónur, ið er 19% lægri enn innara virðið á felagnum. 30. september var partabrævakursurin 192 og marknaðarvirðið 199 milliónir krónur.

## *Shares*

*On 19 November 2008, the shares in Atlantic Airways P/F were traded at DKK 176 per share, which is 25% lower than at the beginning of the year. Total market value of the company at this date was DKK 182 million, which is 19% lower than the book value of the equity. On 30 September 2008 the trading price was DKK 192 per share and total market value DKK 199 million.*

## Hendingar triðja ársfjórðing

Felagið kunngjørdi í september ferðaætlanina fyri komandi summar. Flogið verður alt árið úr Føroyum til Keypmannahavnar, Billund og Reykjavík. Komandi summar verður harumframt flogið til London, Aalborg og Stavanger. Flúgvingin millum London og Hetland er fyribils niðurløgd, tí felagið megnar ikki at kappast móti flogleiðum til Skotlands, sum fáa stuðul frá skotsku stjórnini umvegis Air Discount Scheme-skipanina. Felagið hevur enn ikki gjørt av, hvørt flúgvingin til Stokkhólm umvegis Stavanger verður tikin uppaftur.

## *Important events during the third quarter 2008*

*In September, the company announced its scheduled services for next summer. There will be all-year round flighs from the Faroe Islands to Copenhagen, Billund and Reykjavík, while during the summer of 2009, London, Aalborg, and Stavanger will be added to the schedule. The service between London and Shetland has been closed for the time being, because the company cannot compete with domestic services to Scotland receiving subsidies from the Scottish Government through the Air Discount Scheme. The company is yet to decide whether to recommence the service to Stockholm via Stavanger.*

## Hendingar eftir triðja ársfjórðing

Felagið seldi eitt RJ-85 flogfar í oktober og gjørdi samstundis avtalu við keyparan um at leiga flogfarið aftur í eitt fimm ára skeið. Handilin kastar av sær, men hetta sæst ikki aftur fyrr enn í síðsta ársfjórðingi.

Í oktober varð tvey ára avtala gjørd við Vága Floghavn um rakstur av tollfríari sølu á flogvøllinum í Vágum. Avtalan umfatar sølu í komuhøllini og í fráfaringarhøllini. Avtalan kann verða longd við einum ári.

Tað kemur bæði Atlantic Airways og Vága Floghavn illa við, um kunngerðin viðvíkjandi tollfríum innflutningi av tubakki kortini verður sett í gildi í desember. Hetta rakar inntøkugrundarlagið meint og er steinur omaná byrðu fyri flogvinnuna í Føroyum. Tilboðið, sum Atlantic Airways gav um rakstur av tollfríu søluni, bygdi á tær treytur, sum tá vóru galdandi fyri tollfríari sølu.

17. oktober boðaði Eik Banki felagnum frá, at príssetingin av felagsins partabrøvum á virðisbrævamarknaðinum í Reykjavík fyribils var steðgað orsakað av óvissuni á íslendska marknaðinum. 28. oktober varð príssetingin á virðisbrævamarknaðinum í Reykjavík fyribils uppafturtikin.

Felagið varð í november skrásett á virðisbræva-marknaðinum NASDAQ OMX í Keypmannahavn og er sostatt dupultskrásett eins og hini børsskrásettu føroysku feløgini. Felagið stóð sjálvt fyri arbeiðinum við dupultskrásetingini, meðan Føroya Banki virkaði við til hetta. Avtala er gjørd um *market-making* á bæði íslendska og danska keypsskálanum við Eik Banka. Eitt ískoyti til prospektið, dagfest 9. november 2007, varð almannakunngjørt í sambandi við skrásetingina í Keypmannahavn. Ískoyti liggur alment frammi á heimasíðu felagsins www.atlantic.fo.

13. november hevði "Vinnuvitan" samrøðu við landsstýrismannin í vinnumálum Jóhan Dahl um einskiljingina av Atlantic Airways. Í samrøðuni verður landsstýrismaðurin endurgivin fyri at siga, at hann mælir til at landið keypir aftur partabrøvini í Atlantic Airways, sum landsstýrið hevði selt. Til tess at geva øllum íleggjarum atgongd til sjónarmiðini hjá landsstýris-manninum, sendi felagið eina fráboðan hesum viðvíkjandi 14.november 2008. Landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur seinni greitt felagnum frá, at endurgevingin í samrøðuni endurspeglar ikki nakra avgerð í landsstýrinum ella hugsan landsstýrisins viðvíkjandi ein-skiljingartilgongdini. Útsøgnin í samrøðuni var sambart landsstýrismanninum sjálvum ein opin umrøða av framtíðarmøguleikum.

Eftir roknskaparlok er einki annað hent, sum ávirkar metingina av roknskapinum fyri 1-3. ársfjórðing.

## *Events after 30 September 2008*

*In October, the company sold one RJ 85 aircraft on a 5-year sale and lease back basis. This deal is profitable, but the effects will not show until the fourth quarter of 2008.*

*Also in October, a 2-year agreement was made with the Vágar Airport Authority to operate the duty-free sale at the airport. The agreement includes sales at the arrival and departure lounges, and can be extended by 1 year.*

*It will be detrimental to both Atlantic Airways and the Airport Authority, if the planned ban on duty-free imports of tobacco comes into force in December. This will have a direct effect on the company's earnings, and will add a further burden to the Faroese airline industry. The offer Atlantic Airways submitted to the Airport Authority to operate the duty-free sale was conditional on the prevailing conditions for duty-free sale at the time of tendering.*

*On 17 October, Eik Banki notified the company that the trading of the company's shares on the Reykjavík stock exchange was temporarily suspended because of the uncertainties on the Icelandic stock exchange. Trading in Reykjavík resumed temporarily on 28 October.*

*In November, the company was listed on the NASDAQ OMX stock exchange in Copenhagen, obtaining a dual listing like the other publicly traded Faroese companies. The company handled the dual listing itself, with assistance from Føroya Banki. A market-making agreement for both the Icelandic and Danish stock exchanges has been made with Eik Banki. A supplement to the prospectus from 9 November 2007 was published in connection with the Copenhagen listing. The supplement is available to the public at the company's website www.atlantic.fo.*

*On 13 November 2008, the Faroese Minister of Industry and Trade Jóhan Dahl expressed his opinion regarding the privatisation of Atlantic Airways P/F in the Faroese media. He was quoted by the media to state that he would like to nationalize the company again, if it is possible. In order to give the investors equal access to these statements by the Minister of Trade and Industry, Atlantic Airways P/F referred these news in an announcement to the market 14 November 2008. The Minister of Trade and Industry since then has stated to Atlantic Airways P/F that the quotes in the interview ar e not a reflection of any decision taken or deliberations made by the government regarding the privatisation process of Atlantic Airways. Rather, it is a general and open discussion of the available options to the government regarding the future course of action.*

*There have been no events from the balance sheet date until today that might affect the true and fair view of the financial statement for the first nine months*

## Útlit fyri 2008

Útlitini fyri árið eru hampiliga góð, hóast týðilig tekin eru um viknandi búskapir rundan um okkum og eisini í Føroyum. Størsta innløgan hjá felagnum liggur í triðja og øðrum ársfjórðingi, meðan virksemið er munandi minni um veturin - serliga innan rutuflúgving.

Framskrivingarnar fyri tað, sum eftir er av árinum, benda á eina ávísa lækking í ferðafólkatalinum. Í oktober vaks ferðafólkatalið nakað, men samanlagt verður neyvan talan um stórvegis broyting í mun til ferðafólkatalið í 2007.

